

# Føroyingar fimtbestir at finna olju

**Jan Müller**

27.01.2014 - 16:54

Oljan.fo

*Høgni Højgaard Reynskor, Hákun Eli Johannesen, Martin De Fries Justinussen, Ólavur Eikholm Joensen og lærarin hjá teimum Maiken Skarðennifrá Tekniska Skúla Klaksvík umboðaðu Føroyar og gjørdust nummar 5 í PetroChallenge finaluni, sum var á Imperial College í London leygardagin 25. januar 2014.*

Teir 7 bólkarnir, sum luttóku, høvdu allir vunnið PetroChallenge 2013 í heimlandinum og umboðaðu ávikavist Grønland, Ísland, Føroyar, Bretland, Danmark, Noreg og so Kanada, sum eisini vann í fjør.

Kapping var eisini í USA, men vinnandi bólkurin haðani mátti í síðstu løtu geva avboð til finaluna vegna veður.

Samanlagt vóru umleið fýra túsund næmingar á PetroChallenge skeiði í 2013.

Endamálið við PetroChallenge er at geva miðnámsskúlanæmingum betur innlit í oljuvinnuna, og at kunna um hvørjir útbúgvingarmøguleikar eru.

Royal School of Mines á Imperial College í London er millum heimsins fremstu lærdu háskúlar innan jarðfrøði, jarðalisfrøði, steinafrøði, jarðevnafrøði, tilfarsvísindi, kolvetnisvísindi og -verkfrøði, og tískil eitt gott stað at hava eina finaluna.

Kappingin var sera tøtt millum teir sjey finalubólkarnar, og fleiri bólkar skiftust um at vera á odda. Tað var týðuligt, at allir bólkarin vóru sera væl fyri, og kláraðu seg væl í øllum avbjóðingunum. Tá dagurin var liðugur, lá bólkurin úr Kanada omaná við besta úrslitinum nakrantíð í einum OilSim skeiði.

Endaliga støðan gjørdist:

1. **Kanada**. Jennifer Weber, Stephen Frisk og Cassidy Adam.**$35,3milliardir í virði**

2. **Noreg**. Mari Voll Dombu, Gunhild Brønstad, Marte Haugen Klingen og Kirsti Blækkan **$22,1milliardir í virði**

3. **Stórabretland**. Wojciech Rojek, Gregor Moffat og Jordan Davidson **$21,3milliardir í virði**

4. **Ísland**. Dóra Björg Björnsdóttir, Siggerður Aðalsteinsdóttir og Vigdís María Borgarsdóttir**$21,2milliardir í virði**

5. **Føroyar**. Høgni Højgaard Reynskor, Hákun Eli Johannesen, Martin De Fries Justinussen og Ólavur Eikholm Joensen **$12,9milliardir í virði**

6. **Grønland**. Kenny Jan Fisker, Nick Van Der Gugten Bagger og Niels-Christian Mathæussen **$10,8milliardir í virði**

7. **Danmark**. Joshua Christiansen, Christoffer Rovbjerg Rostvad og Uffe Skovmand Thomsen **$9,7milliardir í virði**

Hetta var 12. árið á rað, at føroyska felagið Simprentis skipaði fyri PetroChallenge á miðnámsskúlum.

Í 2002 vóru einans føroyskir skúlar við, og tá vunnu Hallur Joensen, Rói Jacobsen og Gunnleivur Biskopstø av Tekniska skúla í Klaksvík. Síðani 2003 hevur verið kappast við bólkar úr øðrum londum. Vinnarar síðani 2003 hava verið:

2003 Føroyar

2004 Stórabretland

2005 Føroyar

2006 Danmark

2007 Stórabretland

2008 Ísland

2009 Ísland / Noreg

2010 Danmark

2011 Danmark

2012 Kanada

2013 Kanada

Í 2003 vunnu Marner Joensen, Markus H. Sørensen og Poul Ingi Olsen av Tekniska Skúla Klaksvík, og í 2005 vunnu Doris í Garði Joensen, Ragnhild P. Kjærbo, Kristian Kristiansen av Føroya Handilsskúla Kambsdali. Føroyskir miðnámsskúlar hava luttikið í finalunum øll árini undantikið 2011.

Statoil stuðlaði PetroChallenge Føroyar 2013 og tí eisini føroysku luttøkuni í altjóða finaluni. Simprentis og FOÍB skipaðu fyri.